


## Netanyahu gav avboð

Ísraelski forsætisráðharrin, Benjamin Netanyahu, hevur givið avboð til ráðstevnuna um kjarnorkutrygd, sum verður í Washington í næstu viku. Barack Obama, forseti, hevur kallað leiðararnar í 47 londum á fund um kjarnorkutrygd, og ætlanin var, at Netanyahu skuldi fara. Men í gjár gav hann avboð. Ein talsmaður fyri ísraelsku stjórnina segði, at Netanyahu hevði givið avboð, tí at tvey av luttakaralondunum á ráðstevnuni, Egyptaland og Turkaland, vilja hava ráðstevnuna at umrøða tey ísraelsku kjarnorkuvápnini. Tað vil Ísrael ikki hoyra talan um.

# Skulu ikki drekka meir enn sjey litrar

**RÚSDREKKA** Fólkaheilsuráðið heldur, at rúsdrekkanýtslan í Føroyum skal haldast undir sjey litrum av reinum alkoholi fyri hvønn føroying. Í løtuni eru vit heit tætt uppi undir markinum

Endamálið við politikkinum eigur at vera, at nýtslan í Føroyum skal haldast undir sjey litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva yvir 15 ár.

Tað sigur Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum.

Tað er ein tal, sum ráðið heldur er rímiligt og tey amboðini, sum eru til at halda nýtsluni undir tað, eru atkomuligheitin, prísirnir og so upplýsing.

- Tað liggja ongar vísindaligar rannsóknir aftanfyri hetta talið, tí tað er bara eitt tal, vit hava ásett av praktiskum orsøkum.

Hann sigur, at tá ið vit fingu Rúsuna, var setningurin, at tað skuldi ikki fáa nýtsluna at veksa.

Og tað hevur hepnast serstakliga væl, tí tað er bara hent tvær ferðir, at nýtslan er farin upp um. Tað var í 2002, tá ið nýtslan var 7,1 litrar fyri hvønn íbúgva yvir 15 ár og í 2007, tá ið hon kom upp á 7,2 litrar.

Annars hevur nýtslan øll hesi seinastu árini svingað ímillum 6,6 og 7,0 litrar.

Í 2008 var nýtslan 7,0 litrar, men tølini fyri 2009 eru ikki tøk enn. Hinvegin sigur Elsa Maria Olsen, stjóri í Rúsuni, at fyrstu tveir mánaðirnar í ár, var nýtslan 5%-6% minni enn í sama tíðarskeiði í fjør.

- Útfrá einum fólkaheilsusjónarmiði eigur nýtslan ikki at hækka, tí tað eru mong, sum ikki drekka so tey og tá er tað skjótt, at tey, sum hava tað stóru nýtsluna, verða krøkt so at tað rakar teirra heilsu og teirra sosiala lív.

Hann leggur afturat, at tað er ikki soleiðis í viðurskiftum, sum hesum, at tey, sum drekka tvær ferðir so nógv, sum vit, hava ikki tvær ferðir so nógvar avleiðingar av nýtsluni, men avleiðingarnar eru kanska fýra ferðir so ringar.

Og skuldu vit ført ein rúdrekkapolitikk við lagaligum prísum og lagaligari atkomuligheit, hevði tað elvt til, at nýtslan í Føroyum fór at líkjast teirri donsku, har hon er næstan 12 litrar fyri hvønn íbúgva.

- Tað hevði ikki verið gott fyri summi í Føroyum.

Men kann prísurin ikki koma upp á eitt støðið, har smugling og heimabrenning fer at vinda upp á seg so at myndugleikarnir heilt missa tamarhaldið?

- Tað er sjálvsagt, sigur Pál Weihe.

Men akkurát hvar tað markið er, dugur hann ikki at siga.

# Rúsan má vera eitt sindur modernað

**NÝTSLA** Fólkaheilsuráðið vil styrkja Rúsuna og tí hava tey onki ímóti, at hon eisini verður opin leygardagar

- Rúsan skal ikki vera ein gamal, súrt, statsligt, tvørtræ, tí so missur hon undirtøkuna í fólkinum.

- Tvørtur ímóti má hon vera eitt sindur moderna og kann veita viðskiftafólki eina góða tænasta.

Tað er ein orsøk til, at Fólkaheilsuráðið onki hevur ímóti, at Rúsan nú eisini fer at hava opið leygardagar.

Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum heldur, at tað er neyðugt, at Rúsan hevur dyga undirtøku í fólkinum.

Tí heldur hann eisini, at endamálið eigur at vera at styrkja Rúsuna sum stovn. Men so má hon eisini fylgja við tíðini so at hon kann vera ein tænatustovnur á hampiliga høgum støði.

Av tí sama halda vit eisini, at Rúsan eigur at hava opið í vanligari handilstíð og í dag er vanlig handilstíð eisini leygardagar, tí tað er einasta tíð í vikuni, har nógv fólk sleppa til handils.

- Tann gravgangur, sum sæst í Rúsuni seinnapart fríggjadag, tá ið fólk koma frá arbeiði, er lítið virðiligur, sigur Fólkaheilsuráðið í tilmæli sínum í sambandi við ætlanina at lata Rúsina hava opið leygardag.

Hann sigur fyri sín egnu rokning, at skulu vit tosa um dygd og at samanseta drykkjuvørur og mat, er tað neyðugt at vit hava eina styrkja Rúsu, tí tað er bara ein statslig og peningasterk Rúsa, sum er før fyri at hava eina fjølbroytta goymslu av teimum serligum víni og øli, tí tað hava vanligir handlar ongan møguleika til.

- Men tað hevur eisini týdning, at starvsfólki í Rúsini fær førleikar til at ráðgeva og upplýsa viðskiftafólkinum.

Formaðurin í Fólkaheilsuráðnum staðfestir, at einahandlarnir, sum selja rúsdrekka í hinum norðurlondunum hava eisini opið leygardagar og hann dugir ikki at síggja, hví vit ikki skulu gera tað sama.

# Rúsan er sum eitt apotek

**Tað er andstyggiligt at hækka prísin á rúsdrekka fyri at fylla pengar í landskassan, sigur formaðurin í Fólkaheilsuráðnum**

- Prísurin á rúsdrekka hevur onki sum helst við fíggjarmál ella vinnumál at gera.

Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum er tí rættiliga ørkymlaður av teimum príshækkingum, sum vórðu settar í verk.

- Endamálið við príshækkingunum var ikki at tálma nýtsluni av rúsdrekka. Tað var at útvega landskassanum pening.

Og Pál Weihe staðfestir, at eftir hansara tykki er tað andstyggiligt, at prísurin á rúsdrekka verður hækkaður einans við tí endamáli at fylla pening í landskassan.

- Tað er ikki í familju við okkara sjónarmið í Fólkaheilsuráðnum. Eftir okkara tykki er rúsdrekkapolitikkurin eitt heilsumál og í hesum sambandi er tað púra óviðkomandi hvussu stórt yvirskotið hjá Rúsuni skal vera, staðfestir Fólkaheilsuráðið.

**Rúsan er sum apotekini**

Fólkaheilsuráðið er av teirri áskoðan, at rúsdrekkaspurningar, eru ikki fíggjarmál ella vinnumál.

- Tí átti tað at verið landsstýrismaðurin í heilsumálum, sum umsitur Rúsina.

Fólkaheilsuráðið sigur, at Rúsan hevur somu støðu í føroyska samfelagnum, sum apotekini.

Ráðið hevur tað áskoðan, at bæði Rúsan og apotekini eru veitingarstøð av eini serligari vøru, sum ikki er ein vanlig handilsvøra, men sum hinvegin er ein vøra, sum kann elva til stóran skaða á einstaklingar og samfelag.

- Hetta er tað grundleggjandi sjónarmiðið, sum vit mæla til, verður lagt til grund í viðgerðini av viðurskiftum Rúsdrekkasølu Landsins í Framtíðini, sigur Fólkaheilsuráðið í tilmæli sínum í sambandi við at Rúsan nú eisini skal hava opið leygardag.